Lisa Ekdahl:

# Sjáldsama stjørnan

**Sjáldan havi eg hitt nakað menniskja so fangandi, sum Lisa Ekdahl er. Eftir at hava tikið í hondina á henni og sagt gott kvøld, eri eg longu bergtikin. Hon er so sera nærverandi og rólig, at eg ikki kann annað enn undrast, og lata meg draga inn í hennara heim eina løtu**

LISA EKDAHL
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



Lítillætnið tykist vera veruligt, tá eg takki henni fyri eina góða framførslu. Hon hyggur niður og takkar afturímóti. Hon er so full av mótsetningum. Um somu tíð sterk og skroypilig. Tykist lítil og spøk, men hevur júst sýnt eina ótrúliga styrki á pallinum og ímeðan hon tosar, hyggur hon uppá meg allatíðina, uttan at sleppa eygnakontaktini so mikið sum eina løtu. Røddin er spakmælt og mild, ímeðan hon greiðir frá.

### Áskoðaratalið einki at siga

– Í gjár spældu vit í Keypmannahavn fyri 30.000 áhoyrarum, og í kvøld eru vit her. Í kvøld spældu vit fyri nógv færri fólkum, men tað løgna er, at tað hevur yvirhøvur einki at siga, hvussu nógv fólk eru og lurta. Tað, sum hevur týdning er tað, sum hendir á pallinum. Bæði í mær, ímillum meg og mínar tónleikarar og ímillum meg og tey fólkini, sum eru komin at lurta, sigur Lisa. Hon nýtir hendurnar, ímeðan hon tosar, og brúnu eyguni hyggja allatíðina beint í eyguni á mær, sum vil hon tryggja sær, at eg fái alt við, sum hon sigur. – Tað ger mær ongan mun, hvussu nógv fólk eru har. Bert mín uppliving og upplivingin hjá áhoyrarunum er týdningarmikil, greiðir Lisa Ekdahl frá.

– Í kvøld vóru jú nógv færri fólk enn í gjárkvøldið, men upplivingin er fyri meg júst líka sterk og júst líka intensiv, hóast áskoðaratalið ikki er líka høgt.

– At spæla her var ein fantastisk uppliving. Vit vóru sera glað og vælnøgd við framførðsluna, bæði eg og mínir tónleikarar, sigur hon. Hon tosar spakuliga, hálvavegna teskar, og eg leggi til merkis, at eg geri tað sama.

Spyrji hana hvaðandi íblásturin kemur. Hon svarar, at hon sjálvsagt fær sera nógvan íblástur frá sínum egna lívi og egnum upplivingum. – Men av og á kemur íblásturin eisini frá fólkum, ið standa mær nær. T.d. fái eg nógv frá mínum allarbestu vinkonum. Bara at vera saman við fólki, sum standa mær nær, gevur mær sera nógvan íblástur. So av og á skrivi eg um míni nærmastu og av og á skrivi eg um meg sjálva. Til tíðir kann tað vera torført hjá lurtaranum at avgera hvørt tað er um meg, eg syngi, ella um tað er um onkran, sum stendur mær nær, greiðir hon frá við einum smíli. Hon tosar á syngjandi svenskum, og ger sær stóran ómak við at tosa týðuligt og greitt.

> *– Lisa er jú fantastisk. Tað er ótrúligt at vera við á liðnum. Serliga tí tað er hennara lið. Vit hava tað ógvuliga stuttligt saman, hóast tað er strævið. Hon er skipari og pilot, og vit tónleikarar flúgva bara við henni.*
>
> ***(Tónleikararnir um Lisu)***

### Trælur av egnum sangum?

Táið Lisa var 18 ár, skrivaði hon sangin Vem vet, sum gjørdi hana sera kenda. Men hóast hon hevur skrivað óteljandi sangir og givið nógvar fløgur út síðani, so er tað framvegis sangin Vem vet, sum fólk altíð vilja hoyra. Eisini føroyingar vildu hoyra henda sangin. Er hon ikki vorðin troytt av at syngja somu sangirnar umaftur og umaftur? Er hon á einn hátt ikki vorðin trælur av sínum egna lurtaraskara?

Lisa hugsar seg um eina løtu, áðrenn hon svarar.

– Fyri meg er tað so, at t.d. í kvøld, tá eg sang Vem vet, og eg kendi, at áhoyrararnir svaraðu aftur og vóru við, tá er tað heilt ómøguligt fyri meg at kenna meg troytta av sangunum. At áhoyrararnir respondera, gevur sanginum lív og gevur honum nýggja meining fyri meg, sigur hon og krosskastar knýttu nevarnar inn at bringuni, sum helt hon einum barni. Hon hugsar aftur eina løtu. – So hetta samskiftið ímillum meg og lurtaran ger tað ógvuliga ringt fyri meg at gerast troytt av sangunum. Faktiskt er tað so, at samskiftið við publikum heldur sangunum livandi fyri mær, staðfestir hon síðani.

Eg biði hana síðani lýsa seg sjálva. Hvør er persónurin handan navnið?

Aftur gevur hon sær góða tíð at hugsa seg um í, áðrenn svarið kemur.

– Tað er so ómetaliga torført at skula lýsa eitt menniskja. Óansæð hvat menniskja tú skalt royna at lýsa, so letur tað seg ikki gera, uttan at avmarkað viðkomandi. Vit menniskju eru so óendaliga komplex, við nógvum síðum, so tað letur seg illa gera, at lýsa nakran til fullnar. Hon gevst at tosa, men eg síggi handan brúnu eyguni, at hon hugsar. Síðani heldur hon fram, – Um eg skal royna at beskriva meg sjálva, so má eg staðfesta, at eg havi nógvar ymiskar síður. Tað avhongur alt av ymsu støðunum, eg komi í. Beint undan eini konsert eri eg ofta sera konsentrerað og álvarsom. Eg fokuseri nógv uppá, at eg havi eina stóra uppgávu, tí eg skal geva øllum teimum nakað, sum eru komin fyri at lurta eftir mær og mínum tónleiki. Men til aðrar tíðir kann eg vera meiri tvætlut, fjasut og fnisut og flenna at tingum, sum onnur kanska ikki halda vera serliga stuttlig. Hon steðgar aftur, hesuferð fyri at flenna eitt sindur fyri seg sjálva. Fyri fyrstu ferð í samrøðuni, hyggur hon niður. Men bert eina løtu, áðrenn hon staðfestir: – So tað avhongur heilt av støðuni, sum Lisa Ekdahl er í, hvussu hon er. Eg havi, sum øll onnur menniskju, nógvar ymiskar síður, sigur hon at enda.

Eg takki Lisu fyri, at hon vildi práta við meg uttanfyri »pressutíð«. Aftur prógvar hon, at hon ikki líður av primadonnueyðkennum, tí hon takkar so mirðiliga afturímóti. Eg fái enntá eitt klemm og ein muss á kjálkan, áðrenn eg fari út. Fullkomiliga bergtikin.



LISA EKDAHL
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

# Lisa forførdi



**Ta løtuna ímeðan svenska Lisa Ekdahl var á palli, fullkomuliga rúnarbant hon áhoyrararnar, sum vóru komnir saman á Gøtusandi**

Nógv fólk er komið saman á Gøtusandi at lurta eftir høvuðsnavninum hetta leygarkvøldið, neviliga Lisu Ekdahl

Her eru fólk í øllum aldursbólkum, frá heilt smáum í barnavognum til rættiliga gomul fólk, við stavi. Sandurin er fullur av fólki. Ímeðan vit bíða eftir, at svenska stjørnan skal vísa seg á pallinum, eru onkrir áhoyrarar, sum hita upp við at syngja svenskar pippi sangir.

Róp, floyt og klapp hoyrast, tá tónleikararnir koma út á pallin og byrja at spæla fyrsta lagið. Og so kemur hon rennandi, Lisa Ekdahl. Lítil og skroypilig, klædd í alternativt samansett second hand klæðir, frísut og í eini stórari húgvu, sum hon júst hevur keypt á G!. Róp, klapp og floyt tagna tó brátt, táið hon byrjar at syngja.

Við reinu, spinklu røddini og løgnu rørðslunum fangar hon fólki, sum alt fyri eitt kroystur seg eitt lítið vet nærri pallinum.

Hon syngur mest gomul, kend løg av fløgunum Lisa Ekdahl frá 1994, Med kroppen mot jorden frá 1996 og Bortom det blå frá 1997. Týðiliga hoyrist á áskoðarafjøldini, at serliga fyrsta fløgan, nevnd Lisa Ekdahl og fløgan Bortom det blå, týðum liggja í føroyskum fløguspælarum. Av og á síggja bæði Lisa og tónleikararnir út til at vera púra paff, av at vera komin til eitt so fjarskotið land, har fólk duga hennara svensku sangir.

Fleiri viðmerkingar hoyrast frá fólki, ið ikki enn hava ognað sær nakra av hennara fløgum, at tað verður tað fyrsta tey skulu gera mánamorgunin, táið fløguhandlarnir lata upp.

### Lisa, Lisa, Lisa

Hon nýtir ikki nógva orku uppá at tosa ímillum sangirnar. So skjótt sum ein sangur er liðugur, byrjar tann næsti. Veðrið er fantastiska gott, og aldututlið á sandinum er ein góður stuðul til hennara stillu og kenslubornu sangir, har hon er einsamøll á pallinum við gittara sínum.

Fólk eru mestsum gandað. Sjálvt teir skrappu fýrarnir, sum áðrenn konsertina bara ætlaðu oman á sandin at drekka øl, hava áðrenn langt um líður fingið stjørnur í eyguni, og hóast teir aldri vildu trúð tí áðrenn konsertina, so vátta teir nú, at hesin tónleikurin faktiskt er góður. – Men kanska er tað bara tí hon er so pen, heldur ein teirra forsvarandi fyri.

Men hon hevur veruliga ein eginleika at rúnarbinda fólk við síni heilt sermerktu rødd.

Men áðrenn fólk vita av, sigur hon, at tey nú fara at spæla seinasta lagið. Enn hevur hon ikki sungið kendasta sangin Vem vet, og tað fer eitt skuffað suð ígjøgnum áhoyrarafjøldina, tá seinasti sangurin byrjar, og tey hoyra, at hetta ikki er hann. Hon syngur liðugt, bukkar og fer av pallinum.

Men hetta vilja fólk á sandinum ikki lata sær lynda. Tey vilja hoyra meir. – Lisa, Lisa, Lisa, rópar skjótt allur sandurin í felag. Heri Jacobsen, frásøgumaður kemur út á pallin og spyr um vit vilja hava meir. Lisa, Lisa, Lisa, rópa fólk, nú enn harðari. Og so koma tey aftur inn á pallin. Lisa Ekdahl og tónleikarar hennara. Fyrstu og kendu tónarnir av sanginum Vem vet, skapa ein ovurhonds stóran fagnað og táið Lisa skal byrja at syngja, stemma áskoðararnir í, so hon bakkar aftur frá mirkrofonini. Áskoðararnir syngja fyrsta ørindi og niðurlagið, áðrenn hon byrjar at syngja. Tónleikarararnir hyggja uppá hvønn annan, og minna mest av øllum um spurnaðartekin. Hetta høvdu teir allarhelst ikki væntað. Hon syngur ein sang afturat og bukkar so einaferð afturat. Lógvabrestirnir vilja ongan enda taka, og tað endar við, at hon kemur fram á pallin at klappa fyri áskoðarunum. Síðani hvørvur hon.

Restina av kvøldinum er hon samrøðuevnið á G!. Øll hava fingið somu góðu uppliving, óansæð hvat tey hildu um svenska sangfuglin áðrenn hetta leygarkvøldið á Gøtusandi.

## Lisa Ekdahl um:

*Hvat heldur tú um George Bush?*
– Uhh... George Bush er kanska ikki ein av mínum yndispersónum. Vit eru ikki vinir beinleiðis, hehe...

*Hvønn bil hevur tú?*
– Eg havi koyrikort, men eg dugi ikki at koyra, so..

*Yndisbók?*
– Tað eru nógvar bøkur, sum eg eri púra burtur í. Ein av mínum yndishøvundum er ein amerikanskur høvundur, sum er Amerika kritiskur. Skal eg velja eina av hansara bókum, verður tað Breakfast for champions.

*Yndistónleikur?*
– Um eg bert skal siga ein einasta tónleikara, sum eg dyrki og liggi á knøunum fyri, so má eg siga Bob Dylan.

*Yndisdrikkur?*
– Vatn.

*Hvat heldur tú um Føroyar?*
– Eg eri púra, púra burtur. Eg eri tikin á bóli, ovfarin og fullkomiliga charmerað.

*Hvat hevur tú altíð í køliskápinum?*
– Eg havi altíð ein multivitamindrykk.

*Hvat heldur tú um royking?*
– Ehh... Eg royki ikki sjálv, so...

*Hvat heldur tú um sangin Vem vet?*
– Eg elski hann, tá eg kenni, at sangurin hevur týdning og merkir nakað fyri tey, sum eg syngi fyri.

*Hvat er tín yndismatur?*
– Uhh... nù má eg hugsa meg væl um... Uhh.. Fiskasuppa!

> *– Tað er spell, at vit ikki kunnu steðga longri og síggja meir av Føroyum, men vit hava eitt stramt skema. Fjúrtan konsertir bara í summar.*
>
> ***(Tónleikararnir um Føroyar)***

> *– Vit elska føroyskt øl.*
>
> ***(Tónleikararnir um øl)***

## Meir í morgin

Í morgin verður meiri tilfar í blaðnum um G! Festivalin. Vit frætta nærri frá faktuellum viðurskiftum kring tiltakið, tað vil siga hvussu nógvir gestir vitjaðu, hvussu fíggjarligi parturin hilnaðist o.s.fr.